# ÁRSINS VITANARFRÓÐU

KAPPING 2019/20



## SPURDÓMUR:

## KANN EITT BRANDTEPPI BRENNA?




**Granskarar:**

**6. og 7. flokkur í Viðareiðis skúla**

# INNGANGUR

Vit hava arbeitt við at finna útav, hví eitt vanligt teppi brennur og ikki eitt brandteppi.

Fyri at finna útav, hvat eitt brandteppi er, hava vit leitað á netinum eftir tilfari um brandteppi, og vit hava gjørt samtalur við Finn Hansen, sløkkiliðsleiðara, Trygd, IRF og KOB. Vit hava eisini gjørt eitt spurnarskjal og spurt øll húski í bygdini, um tey hava brandteppi við hús.

Bjarni Poulsen, brandmaður hevur verið og víst okkum, hvussu mann sløkkir eld, millum annað við brandteppi og hvat eitt brandteppi tolir av hita.

Lærari: Hallur Sumberg

Teldupostur: hallur.sumberg@skulin.fo,

Luttakarar:

Bergur Kallsberg, Jutta Petersen, Heidi Alvilda Simonsen, Sjúrður Fløhamar, Eivør Sørensen,

Anna Maria Sørensen, Nóa Jakobsen og Róar Kallsberg

*Vit loyva, at frágreiðingin verður løgd á gransking.fo, og at tilfar úr henni kann verða nýtt til marknaðarføring*

# INNIHALD

1. Hetta undrast vit á

- Hví brennur eitt vanligt teppi og ikki eitt brandteppi?
- Hvat er eitt brandteppi gjørt av?
- Hvussu nógvan hita tolir eitt brandteppi?

2. Hví er tað so?

Okkara hypotesur

- Summi halda, at brandteppi er so tjúkt
- Summi halda, at brandteppi køvir so væl eld
- Summi halda, at kanska liturin á brandteppinum ger mun
- Summi halda, at eitt vanligt teppi er gjørt av ull ella onkrum toyi, og tí brennur tað
- Summi halda at brandteppi er gjørt á onkran serligan hátt

3. Legg eina ætlan

- Vit ætla at gera samrøður við fólk, sum vit meta, vita okkurt um eld og brandteppi.
- Vit fara at leita á netinum eftir upplýsingum, sum kunnu svara okkara spurdómi.
- Somuleiðis ætla vit at gera eina spurnakanning, sum betur kann lýsa støðuna viðvíkjandi, hvussu nógv húski í bygdini hava brandteppi.
- Vit ætla eisini saman við einum brandmanni at gera ástøðiligar royndir við einum brandteppi.

4. Savna upplýsingar

- Gera eitt spurnaskjal
- Samrøða við Finn Hansen (sløkkiligsleiðari)
- Samrøða við IRF
- Samrøða við Trygd
- Samrøða við KOB
- Roynd 1 við grýtu, brandteppi, bensin, vatn, eldsløkkjara, gassblussi og teppum
- Roynd 2 við glasi og gassblus

5. Hetta eru vit komin fram til

6. Sig øðrum frá

- Í skúlanum
- Foreldrum

Fylgiskjøl

- Fylgiskjal nr. 1: Spurnakanningin
- Fylgiskjal nr. 2: Úrslit av spurnakanning
- Telefonsamrøðu við: Finn Hansen, sløkkiliðsleiðara
- Telefonsamrøða við: IRF og KOB
- Telefonsamrøða við: Trygd

# 1. HETTA UNDRAST VIT Á

Vit undraðust á, hví eitt vanligt teppi brennur og ikki eitt brandteppi.

**HER GERA VIT OKKUM NAKRAR TANKAR UM BRANDTEPPI**

Hvat er hetta og hví hongur tað her?



Kann brandteppi brúkast til fólk?



Hvussu stórt er eittn brandteppi.?

Tað er 180 cm x 120 cm.



Her síggja vit brandteppi og eldsløkkjara.



# 2. HVÍ ER TAÐ SO?

Vit hava gjørt okkum nakrar hypotesur um, hvat vit halda um, hví eitt brandteppi ikki brennur.

- Summi halda, at brandteppi er so tjúkt
- Summi halda, at brandteppi køvir so væl eld
- Summi halda, at kanska liturin á brandteppinum ger mun
- Summi halda, at eitt vanligt teppi er gjørt av ull ella onkrum toyi, og tí brennur tað
- Summi halda at brandteppi er gjørt á onkran serligan hátt
- Summi halda, at eitt brandteppi er gjørt úr onkrum serligum evni, sum ikki brennur

# 3. LEGG EINA ÆTLAN

Fyri at finna útav, hví eitt brandteppi ikki brennur, hava vit gjørt okkum eina ætlan.

- Vit ætla at gera samrøður við fólk, sum vit meta, vita okkurt um eld og brandteppi.
- Vit fara at leita á netinum eftir upplýsingum, sum kunnu svara okkara spurdómi.
- Somuleiðis ætla vit at gera eina spurnakanning, sum betur kann lýsa støðuna viðvíkjandi, hvussu nógv húski í bygdini hava brandteppi.
- Vit ætla eisini saman við einum brandmanni at gera ástøðiligar royndir við einum brandteppi.



# 4. SAVNA UPPLÝSINGAR

Tað fyrsta, sum vit gjørdu, var at kanna, um vit høvdu eitt brandteppi heima hjá okkum sjálvum, og um nakað var í skúlanum.







Síðan gjørdu vit eitt spurnablað, har vit spurdu øll húskini í bygdini, um tey hava brandteppi.

Vit hava eisini gjørt nakrar spurningar til Finn Hansen, sløkkiliðsleiðara í Klaksvík, Trygd, IRF og KOB. Fyri at fáa svar uppá hesar spurningar, hava vit ringt til tey, og hava havt samrøðu við tey, og hava soleiðis savnað okkum nakrar upplýsingar um brandteppi.






Vit hava leitað á netinum eftir tilfari. Vit hava eisini fingið Bjarna Poulsen at víst okkum, hvussu man brúkar eitt brandteppi.



# 5. HETTA ERU VIT KOMIN FRAM TIL

Vit hava funnið útav, hvørjum tilfari eitt brandteppi er gjørt úr.

- Innast er er ein vatntøtt hinna, og so er eitt lag av tveimum, sum eitur trevjuglas. Trevjuglas er eitt kent evni, sum man kann brúka til nógv ting t.d. hitapottar, brandklæðir og annað.
- Eitt brandteppi kann tola upp til 900 stig.
- Tað ber ikki til at brúka eitt brandteppi,  um tað er minni enn eldurin.
- Í  teimum gomlu brandteppunum var asbest, men tað er ikki lov at brúka tað nú, tí man kann fáa krabbamein av tí.
- Tað ber til at brúka eitt brandteppi fleiri ferðir.
- Tey siga, at eitt brandteppi kann brúkast í 7 ár.
- Brandteppir eru ymisk í støðd. Nú er ein nýggj støðd av brandteppum komin, sum kunnu dekka elbilar.
- Brandteppi var fyrst uppfunnið í USA í 1960, tað var Theodore Harry Diacos.

Royndin, sum vit gjørdu, saman við Bjarna Poulsen vísti, at ein vanligan eld kundi brandteppi gott sløkkja, men brandteppi tolir ikki, tá ið eldurin blívur for heitur t.d. yvir 900 stig, tí tá smeltar tað.





Brandteppi tolir ikki stikkeld frá einum gassblussi, tí tá er hitin so høgur. Vit vita, at í einum brandteppi er millum annað glas. Royndin saman við brandmanninum vísti, at um vit setti eitt gassbluss á brandteppi, so smeltaði tað.





Vit tosaðu um, um tað bar til at smelta eitt vanligt glas við einum gassblussi. Vit gjørdu royndina, men tað vísti seg, at glasið brast, men tað smeltaði ikki. Vit gjørdu royndina í umleið 5 minuttir.

Møguliga hevði tað smeltað, um vit høvdu brúkt meira tíð til tað.





Vit hava eisini gjørt eitt video brot á YouTube, har vit hava tikið upp, tá royndin við at sløkkja eld við brandteppinum varð gjørd.

https://www.youtube.com/watch?v=iTC4DmeQ0F8

# 6. SIG ØÐRUM FRÁ

Í sambandi við hesa verkætlan fara vit at gera eitt PowerPoint, sum vit fara at vísa fyri børnunum og lærarum í skúlanum. Vit fara eisini at fortelja foreldrum frá tí, sum vit hava arbeitt við, og hvat vit eru komin fram til.

Granskingarráðið fær eisini okkara verkætlan, sum tey eru vælkomin til at leggja á heimasíðuna www. Gransking.fo

# FYLGISKJØL

1. Spurnakanningin
2. Úrslitið av spurnakanning
3. Telefonsamrøðu við: Finn Hansen, sløkkiliðsleiðara
4. Telefonsamrøða við: IRF og KOB
5. Telefonsamrøða við: Spurningar til Trygd

## Fylgiskjal 1

**Hey tit!**

Næmingarnir í 6. og 7. flokki í Viðareiðis skúla gera eina kanning um, hvussu nógv húski á Viðareiði hava brandteppi. Vónandi fáa tit hjálpt okkum at svara hesum spurningi.

Set X

- Ja, vit hava brandteppi ----
- Nei, vit hava onki brandteppi ----

Vinarliga

Nóa, Jutta, Róar, Anna Maria, Bergur, Eivør, Heidi Alvilda og Sjúrður

## Fylgiskjal 2

## Spurningar til Finn Hansen, sløkkiliðsleiðari í Klaksvík

1. Veitst tú um nógv fólk hava brandteppi heima við hús?

- Svar: Onkur hevur.

2.Hvat er eitt brandteppi gjørt av?

- Svar: Innast er tað gjørt av einari vatntættari hinnu, og so er eitt lag av onkrum evni, sum er gjørt at onkrum glasi.

3. Er tað krav at hava eitt brandteppi heima við hús?

- Svar: Tað er ikki krav at hava brandteppi heima, men t.d. á einum gistingarhúsi, skúla v.m. er tað krav.

4. Kann eitt brandteppi brúkast til allar eldar?

- Svar: Nei, ikki um tað er ein stórur eldur, men um tað er eitt lítið bál, so kann mann gott brúka tað.

5. Um man ikki hevur eitt brandteppi ella eldsløkkjara, hvat skal mann so brúka?

- Svar: Eina vatn slangu ella eitt handklæði.

6. Hví kann eitt brandteppi ikki brenna?

- Svar: Í veruleikanum kann eitt brandteppi gott brenna.

7. Um hol er á brandteppinum kann mann brúka tað?

- Svar: Tað er best um tað ikki er hol í tí.

**Fylgiskjal 3**

## Spurningar til Trygd

1. Geva tit brandteppi út til kundar, um so hví?
    - Svar: Nei, vit geva ikki brandteppir til kundarnar.
2. Um mítt hús brennur í grund, fái eg øll tingini aftur?
    - Svar: Tú fært alt aftur og húsið, um tú hevur eina trygging.
3. Vita tit um fólk, sum hava brúkt brandteppi, so at eldurin ikki gerst størri?
    - Svar: Nei tað hava vit ikki kanna.
4. Hvar vilja tit viðmæla at eg skal hava brandteppi inni í húsinum?
    - Svar: Altso tað er einki krav at hava brandteppi.
5. Um eg eigi onkur kostnaðarmikil ting t.d. ein designara taska, er tað neyðugt at fáa hana aftur?
    - Svar: Um tú hevur eina trygging, so er tað eitt krav, at tú skalt fáa alt aftur.
6. Hvussu nógv brandteppi viðmæla tit at hava i hvørjum húsi?
    - Svar: Tað kunnu vit ikki svara uppá, tí tað er einki krav.
7. Eru tað fleiri støddir av brandteppum?
    - Svar: Ja tað eru nøkur sløg, men eg havi ikki kanna tað.
8. Eru tað nógv sløg av merkjum av brandteppum?
    - Svar: Nei tað veit eg ikki.
9. Hvat er tað minsta tit gjalda og tað mesta í endurgjaldið?
    - Svar: Tað veldst um virði á ognini.

10. Kann eg brúka eitt brandteppi at balla meg inní, um eldur kemur í og so renna út?

    - Svar: Tað gangi eg út frá.

## Fylgiskjal 4

## Spurningar til IFR og KOB

1. Hvussu nógvar stig eru í ovninum?

- Svar: IRF/KOB 1050 til 1100 stig.

2. Hvussu nógv stig tolir eitt brandteppi?

- Svar: KOB 400 til 500 stig. Svar: IRF Tað veit eg ikki.

3. Hvat er eitt brandteppi gjørt av?

- Svar: IRF Tað er gjørt av glasi og einum glasdúki. KOB brandteppi er gjørt av einari hinnu, sum ger, at eldur ikki sleppur gjøgnum lagið.

4. Kann eitt brandteppi brennast? Svar:

- IRF Teir hava ikki roynt at brent eitt brandteppi, men teir halda, at tað hevði komið út aftur óbrent. Svar: KOB Nei vit hava ikki roynt tað, men tað kann tað kanska.

5. Kann hol koma á eitt brandteppi?

- Svar: IRF Ja, tað halda vit. Svar: KOB nei, men vit hava sløkt við tí.

6. Hevur liturin á einum brandteppi nakran týdning fyri, hvussu eitt brandteppi riggar?

- Svar: IRF Tað vita vit ikki. Svar: KOB Ja, um tað er silvur litt. Tann liturin tekur megina frá eldinum.

7. Hava tit roynt at brent eitt brandteppi?

- Svar: IRF nei. Svar: KOB

## Fylgiskjal 5

### Spurnarskjal til húskini á Viðareiði

**Hava tit brandteppi?**

**Ja: 31**
**Nei: 59**
**Einki svar: 1**




Omanfyri síggja vit úrslitið frá spurnarkanningini.

Sjálvt um vit ikki spurdu um brandsløkkjara, so nevdu fleiri, at tey høvdu ein brandsløkkjara.

## Fylgiskjal 6

### Í prosentum sær úrslitið soleiðis út!

| Ja | Nei |
|---|---|
| 28,21% | 71,79% |




Á Viðareiði eru umleið 30 summarhús, men tey eru ikki við í kanningin.

## Fylgiskjal 7

- Video brot: https://www.youtube.com/watch?v=iTC4DmeQ0F8